


Mynd: Eidesvik

# Eidesvik umhugsar at leggja fleiri skip

**Jógvan Hugo Gardar**

15.11.2015 - 23:45

Oljan.fo

Roknskapartølini eru blóðreyð hjá norske reiðarínum Eidesvik. Í triðja ársfjórðingi var rakstrarúrslitið 131,1 milliónir norskar krónur, samanborið við 90,9 milliónir í sama ársfjórðingi í fjør. Inntøkurnar øktu úr 259 til 308 milliónir krónur.

Men úrslitið áðrenn skatt gjørdist minus 77,4 milliónir krónur, samanborið við 8,3 milliónir í 2014.

- Støvan er krevjandi í øllum trimum økjunum sum vit eru inni í. Vit síggja at nógv skip verða løgd nu, serliga innan PSV og seismikk. Tað er í dag trupult at siga nær javnvág aftur kemur í marknaðin, og vit rokna við at marknaðurin kemur at vera trupul í 2016 eisini, stendur at lesa í roknskapinum, sum bleiv lagdur fram fríggjadagin.

LES EISINI: **Lønarlækking og broytingar í arbeiðstíðini í oljuvinnuni**

Eidesvik, ið er stórt innan oljuveitingarvinnuna, hevur lagt tvey skip fyri teym. Tað talið kann økja.

Í roknskapinum skrivar nevndin at tey rokna við einum truplum marknaði, og neyðugt verður at minka um útreiðslurnar, og um neyðugt leggja vit fleiri skip.